# Magnus Heinason – Túrfrágreiðing
# Merking av toski. Túrur nr. 1942
# Tíðarskeið: 25/09-02/10 - 2019

**Fólk við frá Havstovuni:** Regin Kristiansen, Poul Vestergaard, Hannipoula Olsen, Mourits Mohr Joensen og Fróði Skúvadal (kanningarleiðari).

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at kanna ferðingarmynstrið hjá toski og øðrum fiskasløgum á føroyska landgrunninum.

**Eyka uppgávur:**

16 smáfiskar á ca. 50 (40-60) cm frá Mýlingsgrunninum vóru frystir heilt óviðgjørdir til umhvørvisstovuna.

**Reiðskapur og onnur útgerð:** Stjørnutrol við 100 mm meskum í posanum. Vágslemmar.
Breitlalongin er 60 m.
Rockhopper grunnur.
Ein pistól verður nýtt til at festa Floymerkini við.
Gulir kassar og slangur.
Mátibretti.
Vekt
Klokka.
Skriviútgerð og teldur.

**Um túrin:**

Vit loystu av Havnini kl. 1900 hóskvøldið hin 25.09. Haðani var stevnt beina leið út á Mýlingsgrunnin, har vit tóku 4 hál. Fiskaríið varð smáligt, so vit fóru suður ímóti Skúvoynni at royna. Har fingu vit nakrar fiskar, men rákið varð hart, harðast á árinum, so har var illa roynandi. Eftir nøkur hál fóru vit vestur á Bøin. Har varð fiskaríið sera smáligt, so eftir eitt hál fóru vit aftur á Mýlingsgrunnin. Har tóku vit 4 hál. Hósnáttina fóru vit eysturum, og royndu har til vit høvdu fingið nokk av fiski. Síðani fóru vit aftur vestur á Bøin, og vóru har til vit fingu ætlaðu mongdina av fiski. Síðani fóru vit aftur suður ímóti Skúvoynni og royndu har til týskvøldið. Vit høvdu 57 hál á túrinum.Vit landaðu til Barið kl 0700 Mikumorgunin hin 02.01.19. Veðrið var sum heild gott allan túrin.

**Fyribils úrslit**

Fiskaríið varð sum heild smáligt. Vit merktu tilsamans 1144 toskar. Eisini merktu vit 7 kalvar. Tilsamans merktu vit 1234 fiskar. Hini fiskasløgini, sum blivu merkt, síggjast í talvuni niðanfyri. Eitt sum vit løgdu til merkis var, at fiskurin vestanfyri var illa fyri, ímeðan eystanfyri var hann væl betur fyri. Hetta sæst eisini av konditiónsfaktorinum í talvuni. Vit fingu 15 merktar toskar aftur. 10 av hesum høvdu verið í sjónum í meira enn eitt ár. Eisini fingu vit eina merkta hýsu aftur.

| | Havtaska | Hvíting | Hýsa | Kalvi | Knurrhani | Reyðsprøka | Steinbít | Tunga | Upsi | Toskur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Á Bønum | 1 | | 11 | 2 | | 4 | 1 | 2 | 1 | 264 |
| Eystanfyri | 6 | 1 | 13 | 3 | 1 | 9 | | | | 305 |
| Á Mýlingsgrunni | 1 | | 3 | | | 5 | | 7 | | 287 |
| Vestanfryi Skúvoynna | 4 | | 12 | 2 | | 6 | | 2 | | 281 |
| | 12 | 1 | 39 | 7 | 1 | 24 | 1 | 11 | 1 | 1137 |

Konditiónsfaktorurin var betri eystanfyri enn vestanfyri, sum sæst á talvuni niðanfyri. Vanligt hevur verið at miðalkonditiónsfaktorurin hesa tíðina liggur væl omanfyri 1, men í ár var hann 0.95. Í magunum á teimum kannaðu afturfingnu fiskunum var eisini lítið í, mest krabbadýr.

| **Økið** | **Miðal K** | **Miðal longdir** |
|---|---|---|
| Á Bønum | 0.925 | 57.821 |
| Eystanfyri | 1.007 | 59.442 |
| V-Mý | 0.941 | 58.167 |
| V-Skúv | 0.958 | 64.149 |
| **TIlsamans** | **0.959** | **59.904** |

<u>Umborð á Magnus Heinason 10.01.19</u>

<u>Fróði Skúvadal</u>